


www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 04 - 2013

# Shell-stjóri ársins oljustjóri

Stjórin í heimsins næststørsta oljufelag, Shell, Peter Voser er kosin ársins oljustjóri í 2013. Hann hevur verið stjóri í Shell síðani 2009 og verður í dag millum oljufólk mettur sum ein tann mest royndi og skilagóði oljustjórin yvirhøvur. Hann byrjaði at arbeiða hjá Shell í 1982. Hann 55 ára gamal og er úr Sveits. Umframt at vera forstjóri í Shell situr hann í nógvum altjóða feløgum og nevndum. Tá oljuráðstevnan ONS varð hildin í Stavanger í fjør hittu løgmaður Kaj Leo Johannesen og Johan Dahl, oljumálaráðharri Shell-stjóran á stórum orkutiltaki, har teir eisini høvdu høvi at umrøða oljuleitingina við Føroyar. Shell var í síni tíð við í oljuleitingini á landgrunninum í tøttum samstarvi við BP. Við oljan.fo tá segði Peter Voser, at Shell fylgir væl við, hvat hendir í oljuleitihøpi kring allan heim og eisini í Føroyum men hevur enn ongar ætlanir um at gera íløgur her. Hvat framtíðin hevur at bjóða er so nakað annað segði nú ársins oljustjóri við føroyska oljuportalin. Mynd Peter Voser, forstjóri í Shell her saman við Kaj Leo Johannesen, løgmanni og Johan Dahl, oljumálaráðharra á orkufundi í Stavanger. Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil her saman við Shellstjóranum og løgmanni og Johan Dahl